# Nú eru tey fýra

**FS Vágar vann útsetta dystin móti TB, og nú tykjast sandoyingar at hava bestu kortini undan endaspurtinum**

2. DEILD
*Jákup Mørk*

Ivaleyst høvdu tvørámenn ætlað sær at klintrað upp á eitt einsamalt fyrsta pláss, tá teir mikudagin skuldu spæla útsetta dystin móti FS Vágum.

Oftani kann tað vera trupult at skula ferðast um Suðuroyarfjørð í miðviku, men vágamenn gjørdu ikki mætari enn at ferðast við tyrluni, og so var lag á monnum at fara suður at spæla, og kortini sita heima í egnari stovu seinni á kvøldi.

Og einki er at ivast í, at hetta loysti seg hjá vágamonnum. Tað var kanska TB, sum átti størra trýstið í dystinum, men gestirnir megnaðu fyri tað mesta at hava tamarhald á, og tá TB so kom fram til sínar møguleikar, gjørdist talan í onkrum føri um heilt stórar avbrennarar.

Í so máta vóru gestirnir effektivari, og tað eydnaðist teimum eisini at koma á odda, tá Sonni Johansen royndi seg við skoti av brotsteigarmarkinum. Nakað seinni kundi Wellington økja eftir hornaspark, og so var talan av álvara um mótbrekku hjá TB.



*Vágamenn tóku alt við sær í tyrluna, tá teir mikukvøldið leiktu útsetta dystin móti TB*
*Mynd: Áki Bertholdsen*

Og hon gjørdist ikki minni eftir steðgin. Tór-Ingar Akselsen fekk lætt spæl, tá hann økti til 3-0, og tá so Wellington enn einaferð skoraði, lá eitt møguligt sorl av álvara í luftini.

TB fekk tó minkað um munin við tvemum tøttum málum móti dystarenda, men spenning fingu teir ikki skapt í hesm dystinum.

Men í oddastríðnum er nú av álvara talan um spenning. Fyri bara tveimum vikum bendi alt annars á, at dysturin á Sevmýru millum TB og AB komandi vikuskifti skuldi gerast avgerandi fyri gullmerkini, men nú tykist hetta at blíva lagnudysturin hjá øðrum av pørtunum.

TB og AB eru framvegis í oddinum við 29 stigum, men tað hava sandoyingar nú eisini, og beint í hølunum á hesum trimum koma vágamenn nú við 27 stigum.

Og eftirverandi dystarskráin bendir kanska á, at tað í veruleikanum eru sandoyingar, sum eru størstu favorittarnir.

Sandoyingar hava tey bæði komandi umførini heimadystir móti botnliðunum báðum, VB og KÍ, áðrenn teir í seinasta umfarinum vitja hjá B36, sum er trið niðasta liðið.

Vágamenn skulu leygardagin royna seg í Klaksvík, har lítið hevur borið til í ár, men síðani verður talan um tveir truplar dystir. Fyrst úti móti væl koyrandi LÍF og síðani heima móti AB.

TB hevur sum sagt AB á heimavølli leygardagin, og síðani eru tvær grannauppgerðir móti ávíkavist Royn (úti) og VB (heima) og tað plaga vanliga at vera truplir dystir.

Og AB stendur helst við truplastu skránni. Fyrst á Sevmýru móti TB, síðani heima móti Sumba og at enda á útivølli móti FS Vágum.

# Endurtøka í finaluni

**HB og EB/Streymr, sum ongantíð hevur vunnið unglingadeildina, tryggjaðu sær mikukvøldið plássini í unglingafinaluni, sum skal spælast á mikkjalsmessu**

UNGLINGAR
*Jóannes Hansen*

Unglingafinalan í fótbólti í ár verður endurtøka av finaluni í fjør. Tá vóru tað HB og EB/Streymur, sum spældu. Á mikkjalsmessu fæst at síggja, um úrslitið fer at verða tað sama, sum tað var í fjør, ella um tað hesa ferð fer at eydnast teimum í Sundalagnum at vinna. Í fjør vann HB 2-1. Finalan skal spælast á uttanveltaðum vølli. Í fjør varð hon spæld í Gøtu. Enn er ikki greitt, hvar hon verður, men tað man vera sannlíkt, at hon verður onkra staðni í Eysturoy.

Mótstøðuliðið hjá HB í Gundadali var B36. Leikgongdin og úrslitið var staðfesting av, at støðan í yngru deildunum hjá HB er fleiri ferðir betri, enn hon er í B36. HB vann 6-1, eftir at teir høvdu verið á odda 4-0 í steðginum.

Jóhan Eyvind R. Mouritsen setti hol á í 10. minutti, og ein minutt seinni økti Eli Thorsteinsson. Í 25. minutti skoraði Svenn Jacobsen, og fýra minuttir undan steðginum økti Rókur av Fløtum Jespersen upp á brotsspark.

Stutt eftir steðgin smekkaði Rasmus Nolsøe fríspark í meskarnar, og í 53. minutti var tað ein annar av teimum, sum hevur verið á besta liðnum, Páll M. Joensen, sum skoraði, áðrenn Tummas Rubeksen fyri B36 pyntaði um.

Á Mølini á Eiði vann heimaliðið 3-0 á NSÍ, eftir at teir í steðginum høvdu verið á odda við einum máli. Hálvur tími var farin, tá ið Búgvi Øster skoraði. Leif Niclasen, sum hevur snoddað til besta liðið, økti til 2-0, áðrenn Marni Djurhuus, sum er fastur fúsur á besta liðnum, staðfesti við brotssparki, eftir at Arnbjørn Hansen var feldur.

EB/Streymur hevur ongantíð vunnið unglingadeildina. HB var meistari í fjør, og síðani unglingadeildin sá dagsins ljós í 1967, hava teir verið meistarar sekstan ferðir.

Fyrr í summar vann HB steypafinaluna ímóti Skála. HB sendi EB/Strreym úr steypakapingini, tá ið teir vunnu 6-1 á teimum.

## 2. deild menn

| | d | v | j | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 TB | 15 | 9 | 2 | 4 | 38 | 21 | 17 | 29 |
| 2 B71 | 15 | 9 | 2 | 4 | 39 | 28 | 11 | 29 |
| 3 AB | 15 | 9 | 2 | 4 | 26 | 19 | 7 | 29 |
| 4 FSV | 15 | 8 | 3 | 4 | 52 | 28 | 24 | 27 |
| 5 Royn | 15 | 8 | 0 | 7 | 35 | 34 | 1 | 24 |
| 6 LÍF | 15 | 6 | 4 | 5 | 25 | 28 | -3 | 22 |
| 7 Sumba | 15 | 6 | 4 | 5 | 23 | 26 | -3 | 22 |
| 8 B36 | 15 | 4 | 2 | 9 | 21 | 42 | -21 | 14 |
| 9 KÍ | 15 | 2 | 3 | 10 | 22 | 33 | -11 | 9 |
| 10 VB | 15 | 1 | 4 | 10 | 14 | 36 | -22 | 7 |

## Danska 1. deild

| | d | v | j | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 HIK | 7 | 5 | 1 | 1 | 18 | 8 | 10 | 16 |
| 2 Sønderjyske E | 7 | 4 | 2 | 1 | 18 | 9 | 9 | 14 |
| 3 AC Horsens | 7 | 4 | 1 | 2 | 13 | 8 | 5 | 13 |
| 4 Køge | 7 | 3 | 3 | 1 | 21 | 12 | 9 | 12 |
| 5 Skjold | 6 | 4 | 0 | 2 | 13 | 9 | 4 | 12 |
| 6 Vejle | 7 | 4 | 0 | 3 | 19 | 16 | 3 | 12 |
| 7 NFA | 7 | 3 | 2 | 2 | 21 | 13 | 8 | 11 |
| 8 Fredericia | 7 | 3 | 2 | 2 | 16 | 9 | 7 | 11 |
| 9 Fremad Amager | 6 | 3 | 1 | 2 | 13 | 8 | 5 | 10 |
| 10 Frem | 6 | 2 | 3 | 1 | 7 | 4 | 3 | 9 |
| 11 AB | 6 | 3 | 0 | 3 | 10 | 12 | -2 | 9 |
| 12 Brønshøj | 6 | 1 | 1 | 4 | 10 | 20 | -10 | 4 |
| 13 Næstved | 7 | 1 | 1 | 5 | 6 | 16 | -10 | 4 |
| 14 B 93 | 7 | 0 | 4 | 3 | 7 | 19 | -12 | 4 |
| 15 Ølstykke | 7 | 1 | 1 | 5 | 5 | 20 | -15 | 4 |
| 16 Dalum | 6 | 1 | 0 | 5 | 8 | 22 | -14 | 3 |

**Føroyskir leikarar:** Gunnar Nielsen, Jón Rói Jacobsen (Frem), Jann Ingi Petersen, Andrew av Fløtum, Hjalgrím Elttør (Fremad Amager), Johan Byrial Hansen (AC Horsens)



# 100 ára hald hjá Bláa Krossi í Hvalba 17.-18. september

Nógv ymiskt verður á skránni, og vóna vit, at nógv fólk vilja nýta høvi, at hátíðarhalda hendan dagin saman við okkum.

Tiltøkini leygardagin vera í fimleikahøllini í Hvalbiar skúla. Møti um kvøldi verður í missiónshúsinum.

Skráin sær soleiðis út:

**Leygardagin 18. september 2004**
kl. 10:00 100 ára haldi verður sett
Tórhild Bjarkhamar - Hvussu hjálpa vit børnum sum líða
Poul Jákup Lundsbjerg, greiðir frá sínum lívið
Spurningar og viðmerkingar.

kl. 14:00 Absalon, búktalari og Ásbjørn, gyklari hava okkurt stuttligt til børnini
Børnini fáa okkurt heim við frá Bláa Krossi Føroya

kl. 20:00 Møti við Alfred Olsen
Sangkreftir úr Porkeri
Jaspur Langgaard, endar

**Sunnudagin 19. september 2004**
kl. 12:30 Kirkjugongd í Hvalbiar Kirkju - Sverri Steinhólm

**Øll tiltøkini eru ókeypis**

Bláí Krossur
BLUE CROSS IN FAROE ISLANDS


## Reingerðarfólk til Krás

Søkt verður eftir tveimum reingerðarfólkum til Krás í Hósvík at byrja sum skjótast. Arbeiðið fer fram eftir vanliga arbeiðstíð. Áhugað fáa meira at vita við at ringja og spyrja eftir Jens Ingolf á telefon 422661.

Pf. Poul Hansen Heilsøla

Krás

*Krás er eitt matvøruvirki, ið framleiðir viðskera og døgurðamat. 10 fólk arbeiða hjá Krás, ið heldur til í Hósvík.*




FØROYA LANDFÚTI
POLITIMEISTARIN

## KUNNING FRÁ FÚTASKRIVSTOVUNI UM PASS

Tann 1. oktober 2004 verður nýggja útgávan av føroyska/danska passinum tikin í nýtslu.

Nýggja passið er eitt hátøkniligt trygdarpass.

**Onki krav verður sett um umbýtan av galdandi passi!**

Av tí at nýggja passframleiðsluútgerðin er so kostnaðarmikil, er avgerð tikin um at gevast við passframleiðsluni í Føroyum, soleiðis at øll passframleiðsla verður miðsavnað í Danmark.

**Hetta ger, at møguleikin hjá fútaskrivstovuni í skundi at útskriva nýtt pass eftir 1. oktober 2004 dettur burtur.** Í staðin ber til í summum førum at framleingja verandi pass ella at fáa útflýggja "provisorisk" (fyribils) pass.

**Hetta førir eisini við sær, at passavgreiðslutíðin tá verður umleið 2 - 3 vikur.** Tí er alneyðugt, at fólk, ið hava tørv á nýggjum passi eftir 1. oktober 2004, umbiðja passið í góðari tíð.

Frá 1. oktober 2004 kunnu børn undir 15 ár ikki verða skrivað í pass hjá foreldrum ella øðrum og skulu tá hava egið pass.

Mannagongdin at umbiðja pass verður hin sama sum nú. Passavgreiðslur eru á fútaskrivstovuni í Havn og á politistøðunum uttanfyri Havnina.

Upplýsingar um pass annars eru tøkar á heimasíðuni hjá politinum: www.politi.fo

M. Nepper-Christensen

Smyrilsvegur 20 Postboks 3018 FO-110 Tórshavn Tel (+298)351448 Telefax (+298) 351452

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. P/F 3365,
**P/F NOTIO Framtaksfelag, 100 Tórshavn.**

**Viðtøkur broyttar:**
23.08.2004
**Kapitalur:**
Hækking við kr. 38.920.000,00 til kr. 71.800.000,00
**Inngjaldingarháttur:**
Kontant kr. 38.920.000,00 til kurs 125.

Skráseting Føroya tann 13. september 2004

Kristin Balle


www.sosialurin.fo

# Til sølu
## VW POLO 1.4



Árg. 2001 · Bilurin er sum nýggjur · Sera lagalig fígging

**Útgjald bert kr. 22.000,-**
**Restina práta vit um.**

**VIT HAVA OPIÐ LEYGARDAGIN**
**KL. 11:00 til 16:00**

Sí onnur tilboð á www.bilfridkan.fo
Bilfríðkan á Hjalla
*Tel 35 73 00 ella 21 73 00*
*landsins lagaligasta brúktbilafígging*

Sosialurin 341800

